# Tveir unglingar renna aftaná veteraninum

**Um nakar fer at hótta John Rødgaard, so verður tað Hans Kristian Simonsen, og Martin Poulsen hevur eisini ein møguleika**

FM Í TALVI FYRI EINSTAKLINGAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*John Rødgaard er greitt omaná í endaspælinum ímóti Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tað kann væl hugsast, at tað longu í dag, Skírisdag, verður greitt, hvør fer at vinna FM kappingina í talvi fyri einstaklingar 2004. Tvey umfør eru á skránni í dag. Undanfarnu árini hevur verið telvað allar dagarnar í dimbuldagavikuni. Men á Toftum verður ikki telvað Langa fríggjadag. Í morgin er frídagur. Tí eru tvey umfør á skránni í dag. Lagt verður fyri klokkan tíggju, og seinna umfarið er á skránni klokkan trý seinnapartin. Síðsta umfarið verður leygardagin klokkan tíggju.

Eingin ivi er um, at John Rødgaard er stórfavorittur at vinna FM heitið, sum hann hevur vunnið fleiri ferðir áður. Seinasta ferðin, at hann vann FM, var í 2001. Tá ið fimta umfarið var liðugt týskvøldið, hevði John Rødgaard framvegis ikki tapt. Tryggur og avmáldur og uttan á nakran hátt at vísa tekin um, at hann yvirhøvur hevði hugsað um at gera royndir, sum kanska kundu miseydnast, hevði hann dyggiliga sektað minstu mistøkini hjá mótstøðumonnunum. Tað hevði borið fýra stig við sær í trimum vunnum og tveimum jøvnum talvum.

Í fimta umfarinum totaðist Carl Eli Nolsøe Samuelsen í vónini um, at støða skuldi taka seg upp, sum bar remis við sær. Teir báðir sótu longri enn allir hinir. Men John var ikki til at vika í endaspælinum. Harvið var møguleikin hjá Carl Eli fyri fyrstu ferð at vinna FM heitið burtur. John var tann einasti, sum týsdagin fekk fulla úrtøku við hvíta fólkinum.

Umframt Carl Eli er tað ein annar í landsliðsbólkinum á Toftum, sum ikki hevur vunnið FM. Tað er Olaf Berg. Hann stóð seg ikki serliga væl í fyrstu umførunum, men týsdagin tvífaldaði hann við svarta fólkinum og við sigri á Boga Ziska um úrtøkuna.

## Kendi alt uttanat

Føroyameistari í 2002 var Hans Kristian Simonsen. Hann hevur gjørt nógv við telvingina síðstu tíðina. Eftir at hava luttikið í fleiri kappingum uttanlands er hann í góðari dystarvenjing. Tað noyddist Torkil Nielsen, sum hevði hvíta fólkið, at ásanna týsdagin.

Torkil er saman við Jens Kristiani Hansen tann, sum fyri longst tíð síðani fyrstu ferð var við í FM kappingini. Tað er ein fjórðings øld síðani, at teir – báðir hava teir áður verið meistarar – luttóku fyri fyrstu ferð. Felags fyri teir báðar er, at teir verða mettir at hava framúr gávur at telva, og tað er eisini felags fyri teir báðar, at teir seinnu árini ikki hava gjørt so nógv við telvingina.

Hans Kristian Simonsen hoyrir til nýggja ættarliðið, sum hevur gjørt nógv við at seta seg inn í teoriina. Týsdagin nýtti hann frarnska verju. Tá ið teir báðir eftir dystarlok tóku talvið ígjøgnum aftur, segði Hans Kristian, at hann kvøldið fyri og tíðliga henda morgunin hevði verið nógv talv hjá Torkili ígjøgnum, og hann var komin til, at franska verjan var tann besta.

– Teir fyrstu trettan leikirnar telvaðu vit púra beint eftir teoriini. So veik Torkil eitt sindur frá. So uppstóð støðan við finnum á d4 og e6. Í eini bók er eitt kapitul víkt hesum temanum í fronskum, og tað dugi eg uttanat, staðfesti ungi maðurin.

Torkil striddist manniliga ímóti Hans Kristiani, sum stútt og støðugt át seg inn á mótstøðumannin. Torkil var í svárari tíðarneyð. Tað kom fleiri ferðir fyri, at hann bara átti eitt sekund eftir av tíðini, tá ið hann flutti og harvið legði ein hálvan minutt afturat. Men at enda legði hann kongin.

## Fylgir við í Houston

Ein annar av ungu og dugnaligu monnunum, sum hevur gjørt nógv við at seta seg inn í teoriina er Martin Poulsen, sum var meistari í fjør. Eftir fimta umfarið hevði hann framvegis møguleika at endurvinna FM heitið. Um tað skuldi eydnast, var tað alneyðugt, at hann vann í sjeynda umfarinum ímóti John Rødgaard. Teir báðir settu seg við talvborðið klokkan tvey seinnapartin í gjár. John átti hvíta fólkið.

Martin eigur næsthægsta styrkistalið í hesi kappingini. Talið hjá honum er 2258. Mikudagin hevði hann í fimta umfarinum Jens Kristian Hansen yvirav sær. Styrkistalið hjá Jens Kristiani er 2182.

Hetta talvið hevði, sum rímuligt er, serligan áhuga millum áskoðararnar. Talan var um eitt sindur fløkta og ikki avkláraða støðu, tá ið Martin, sum hevði hvítt, bjóðaði remis. Jens Kristian hugsaði seg um eina løtu, og so tók hann av. Toftamenn, sum høvdu eygleitt, vildu vera við, at teirra maður hevði staðið betri og átti at havt hildið fram eina løtu afturat. Men Jens Kristian tóktist nøgdur við hálva stigið.

Tá ið teir báðir sótu og eftirmettu, sást hvussu bitnir telvarar eru av sínum spæli ella stríði, mugu vit heldur kalla tað. Pápi Martin fylgdi soninum. Hetta var síðsti møguleikin hjá honum í hesum umfarinum. Hann skuldi av landinum og tvørtur um Atlantshavið í arbeiðsørindum. Hann vónaði at fáa møguleikan í Houston í Texas at fáa høvi á onkrari teldukafe í lufthavnini at sleppa inn á heimasíðuna hjá Talvsambandinum (faroechess.com) at frætta, hvussu tað hevði hilnast hjá soninum.

Tað var ikki fyrrenn pápin var farin væl og virðiliga frá borðinum, at Martin leyp upp fyri at biðja farvæl!

## Býttu um leiklutir

Umboðini hjá Klaksvíkar Talvfelag í landsliðsbólkinum eru Steintór Rasmussen og Rani Nolsøe. Teir báðir hildu týdkvøldið, at teir neyvan vóru røttu umboðini fyri felagið, um ætlanin var at vinna FM fyri einstaklingar, umframt at felagið frammanundan hevði vunnið FM kappingina fyri lið.

Í fimta umfarinum sótu teir yvirav hvørjum øðrum. Rani, sum hevur 2101 í styrki, meðan Steintór hevur 2096, hevði hvíta fólkið. Sambært Steintóri hevur tað í FM kappingum fyri einstaklingar oftast verið soleiðis, at Rani hevur verið omaná, tá ið vinmenninir og Frændirnir hava dystast. Soleiðis var tað ikki hesa ferð.

Tá ið teir báðir tóku talvið ígjøgnum aftur, eftir at tað var koppað til fyrimunar fyri Steintór, staðfesti Rani, at hann rættuliga tíðliga hevði verið ov bleytur og ikki hevði syrgt fyri at fáa hvíta bispin hjá Steintóri, sum seinni gjørdist rættiliga sentralur, kroystan út úr spælinum, og samstundis hevði hann verið óneyvur við øðrum riddaranum hjá sær. Tað kostaði nógv. Støðan hjá Steintóri gjørdist sterkari, og hóast Rani í endaspælinum royndi, so var tað týðuligt, hvønn veg tað bar.

## Støðan

Eftir fimm umfør var støðan í landsliðsbólkinum henda: John Rødgaard 4,0 stig, Hans Kristian Simonsen 3,5 stig, Martin Poulsen 3,0 stig, Steintór Rasmussen, Bogi Ziska og Carl Eli Nolsøe Samuelsen 2,5 stig, Jens Kristian Hansen og Torkil Nielsen 2,0 stig og Rani Nolsøe 1,0 stig.

Í gjár varð telvað soleiðis: Hans Kristian Simonsen-Rani Nolsøe, Jens Kristian Hansen-Torkil Nielsen, John Rødgaard-Martin Poulsen, Steintór Rasmussen-Bogi Ziska og Carl Eli Nolsøe Samuelsen-Olaf Berg.

Í fyrsta bólki var Eyðálvur Johannesen úr Kollfjarða Talvfelag á odda við 4,5 stigum. Liðfelagin hjá honum, Bernard Thomsen, hevði 4,0 stig, og Finnbjørn Vang úr Klaksvíkar Talvfelag hevði 3,5 stig eftir fimm tey fyrstu umførini.

Í unglingabólkinum var Helgi Dam Ziska úr Havnar Telvingarfelag á odda við 5,0 stigum ella fullari úrtøku. Næstir honum vóru sandavágsmenninir Rógvi Egilstoft Nielsen og Jón Gregersen og Bogi Hansen úr Klaksvíkar Talvfelag. Teir høvdu allir 4,0 stig.



*Veteranarnir og fyrrverandi meistararnir Bogi Ziska, Jens Kristian Hansen og Steintór Rasmussen eru fullkomuliga upptiknir, tá ið teir taka talvini ígjøgnum aftur*



*Martin Poulsen hevur hvíta fólkið ímóti Jens Kristiani Hansen*



# Til Viborg á Hondbóltsskúla

**Saman við fýra øðrum hondbóltsgentum fer Barbara Egilstrøð í heyst á hondbóltsskúla í Viborg, har Ulrik Wilbek verður ein av venjarum hennara**

HONDBÓLTSSKÚLI
*Jákup Mørk*

Fyri einum ári síðani settu tey í Viborg á stovn eitt sonevnd sports-college. Eitt slag av eftirskúla, har næmingarnir sjálvandi fyrst og fremst kunnu nema sær tann lærdóm, sum hoyrir skúlanum til, men har ítróttur er ein lutfalsliga stórur partur av tímatalvuni.

## Fimm føroyskir leikarar

Og komandi heyst verða ikki færri enn fimm føroyskar hondbóltsgentur, sum vera partur av næmingunum á skúlanum.



*Barbara ivast ikki eina løtu í, at uppihaldið í Viborg fer at verða henni til stórt gagn*

Tá fara nevnliga Harriet Lava, Rebekka Justinussen, Helena á Krákusteini, Ninna K. Johansen og Barbara Egilstrøð til Danmarkar, og einki er at ivast í, at tær eru spentar til hesa upplivingina.

Herfyri hittu vit eina av Barbaru og fingu eitt stutt prát um ætlanir hennara, og hon dylir ikki fyri, at tað er við stórum spenningi, at hon so smátt er farin at venja seg við tankan um eitt ár uttanlands.

Ikki minst er tað tann sannroynd, at millum venjararnar á skúlanum eru nakrir av bestu hondbóltsvenjarunum í Danmark. Teirra millum Ulrik Wilbek, sum er høvuðsmaðurin aftan fyri hondbóltin.

– Tað sigur seg sjálvt, at tá slíkir venjarar eru, soført tú meira burturúr. Bara tað at teir eru har, gevur tær íblástur, og hetta er nakað, sum eg gleði meg ógvuliga nógv til.

Víðari sigur Barbara, at hon og Harriet sjálvar vóru og vitjaðu á skúlanum seinasta summar, og tó at hetta tá ikki var heilt soleiðis, sum tað verður í heyst, so fekk hon alt fyri eitt hug til meira.

– Tú kendi alt fyri eitt, at støðið her er rættiliga høgt, og eg ivist ikki í, at vit koma at fáa sera nógv burtur úr á skúlanum. Bæði tí hetta er ein veldug uppliving, men so sanniliga eisini ítróttarliga.

Og spurd, hvørt hon eisini hevur hugsað um, hvat hon skal svara, um hon fær møguleikan at gera enn meira við hondbóltin í onkrum donskum felag, sigur hon, at tað hevur hon sum so ikki.

– Tað vildi sjávlandi eisini verið spennandi, men fyrst og fremst er tað skúlin og tær upplivingar og tann menningin, sum hesin gevur, sum eg fari til. Tað er tað týdningarmesta, sigur hon avgjørd.

## Ongar avbjóðingar

Ein skuldi kanska hildið, at ein skúli av slíkum slag við somikið navnframum venjarum, hoyrir til teir heilt kostnaðarmiklu, men soleiðis er tó ikki.

Barbara sigur, at kostnaðurin er góðar 18 túsund krónur, og hóast tað kann ljóða av nóg so nógvum, so eru ikki stórvegis trupulleikar av at finna skúlar, sum kosta væl meira enn hetta. Eitt púra vanligt árskeið á ítróttarháskúlum liggur ofta um einar 30-40 tkr., og so eru sjálvandi aðrir, sum eru enn dýrari.

Og sum Barbara eisini noyðist at staðfesta, so er hetta ein av teimum heilt fáu møguleikunum, sum hon hevur til at nema sær royndir innan hondbóltin. Í øllum førum tað slag av royndum, sum ikki fáast her heima.

Sum so nógvar av javnaldrum sínum, so er hon nevnliga komin beint í tað holið, sum kom eftir at arbeiðið við yngru landsliðunum hjá HSF steðgaði, og tí eru ikki nakrar avbjóðingar av hesum slag til hennara. So er bara at vóna, at uppihaldið í Viborg kann geva henni og skúlafeløgunum nakað av lærdómi, sum tær onkursvegna kunnu hava við sær aftur til Føroya um eitt gott ár. Ella – um væl vil til – um fleiri ár.

# Fái U-landsliðini aftur

**Lotte Sørensen er ein av fleiri, sum hevur eina avgjørda meining um menningina av føroyskum hondbólti. Ungu leikararnir skulu hava spennandi avbjóðingar**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*



*– Av seinasta roknskapinum hjá Hondbóltssambandinum framgekk, at samlaði kostnaðurin av U-18 kvinnulandsliðnum ikki var meira enn tað, sum ein venjingarlega hjá A-landsliðnum til Grønlands kostaði, sigur Lotte Sørensen millum annað*

Síðani hon kom til landið og fram til seinastu dystirnar í fjør, hevur Lotte Sørensen verið at rokna millum fremstu kvinnuligu leikararnar í landinum. Og tó at skaðin, sum hon tá fekk, hevur sett ein fyribils steðg fyri spælinum á vøllinum, so man hon framvegis teljast millum virknastu hondbóltsvenjararnar í landinum. Hjá Kyndli hevur hon havt ábyrgdina av stórum parti av ungdómsarbeiðinum, og eisini var hon í fleiri ár knýtt at arbeiðinum við ungdómslandsliðunum í hondbólti. Eitt arbeiði, sum nú er steðgað.

## Ein skandala

Og júst hetta, at U-landsliðini liggja óvirkin, heldur Lotte vera einki minni enn eina vanlukku fyri føroyskan hondbólt.

– Sjálv ivist eg ikki í, at hetta er størsta skandalan, sum er hend fyri føroyskan hondbólt. Nú var eg sjálv við í hesum arbeiðinum í fýra ár, og eg haldi eisini, at vit gjørdu risa-stór framstig. Fyrstu árini vóru vit at kalla hvørja ferð fyri stórtapum, men úrslitini batnaðu munandi, og tá vit fyri tveimum árum síðani vóru í Hollandi við U-18 liðnum, var um reppið at vunnu ein dyst. So er spurningurin sjálvandi, hvørji mál tú skalt seta tær, men í okkara føri haldi eg, at vit gleddu okkum til løtuna, har fyrstu stigini kundu koma.

– At hetta arbeiðið er parkerað fyribils merkir so eisini, at menningin hjá leikarunum partvíst steðgar. Sum minstakrav átti talan um ikki annað at verið um eina U-21 kapping.

## Gevast

Tað hevur ofta verið havt a munni, at um leikarar ikki á ungum árum verða brýndir til altjóða kappingarnar, so eru vit eftirbátar, tá talan gerst um A-landsliðini hjá kvinnum og monnum, men sjálv heldur Lotte, at støðan er nógv meira álvarslig enn sum so.

– Vit koma at standa í teirri støðu, at leikarar gevast, áðrenn tey nakran tíð koma so langt sum til A-landsliðið, sigur hon, og sipar her til, at uttan tær avbjóðingar, sum t.d. u-landsliðini geva, er skjótt, at fleiri evnarík ítróttarfólk finna sær aðrar og meira spennandi avbjóðingar enn tær, sum hondbólturin kann geva.

## Kostnaðurin er undanførsla

Eitt av argumentunum, sum hevur verið at hoyrt í kjakinum um U-landsliðini er, at týdningurin av einum A-landsliði er størri, tí hetta er tað, sum skal skapa áhugan. Henda fatanin stendur so mótvegis øðrum, sum vilja vera við, at uttan U-landsliðini er als ikki grundarlag fyri einum A-landsliði.

Hvørt av hesum hevur størri týdning, tykist Lotte ikki vilja leggja seg úti, men hon staðfestir tó, at tað ikki eigur at vera fíggjarliga grundarlagið, sum er orsøkin til, at tað bert verður satsað upp á annað av hesum.

– Av seinasta roknskapinum hjá Hondbóltssambandinum framgekk, at samlaði kostnaðurin av U-18 kvinnulandsliðnum ikki var meira enn tað, sum ein venjingarlega hjá A-landsliðnum til Grønlands kostaði. Sjálvandi er ymist – alt eftir mótstøðulondunum – hvat luttøkan í ymsu kappingunum kostar, men at nýta so stórar ressourcir til nakrar venjingardystir hjá manslandsliðnum. Tað er í meira lagi, heldur hon.

Og so heldur hon eisini at enda, at Hondbóltssambandið fyrst og fremst má gera upp við seg sjálvt, hvat endamálið við landsliðsarbeiðinum skal vera.

– Vit kunnu til dømis skeita at fótbóltslandsliðnum. Har hevur tað tikið 10-15 ár at komið upp til støðið, sum liðið hevur í dag. Og tað er einki at ivast í, at HSF noyðist at hugsa eins langsiktað. Arbeiðið við at menna hondbóltin er ikki nakað, sum bara tekur eitt ár ella tvey, og tað hjálpir heldur einki, at arbeitt verður í eitt ár og síðani steðgað í tvey. Tað krevur drúgt og støðugt arbeiði, um vit skulu koma nakran veg. Somikið einfalt er tað, sigur Lotte Sørensen at enda.

## Móti PSV og Bochum

**Í hesum døgum er 15 ára gamli HB-leikarin, Kristian Restorff Mouritsen á Týsklandsferð við danska felagnum Frem. Dreingjaliðið hjá danska felagnum skal á ferðini leika ímóti so kendum liðum sum PSV Eindhoven og VFL Bochum**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kristian Restorff Mouritsen hevur fyrr í ár verið og vant við Brøndby, og nú hevur Frem so frætt um evnaríka føroyska leikaran. Danska felagið bjóðaði Kristiani við dreingjaliðnum hjá sær á Týsklandsferð, har Kristian fær høvi at venja og spæla við Frem. Danska superligafelagið hevur tríggjar aðrar føroyingar, nevnliga Gunnar Nielsen, Jónas Næss og Boga Hermanssen, sum allir tríggir eisini verða við í kappingini í Týsklandi. Tað er føroyski fótbóltsumboðsmaðurin, Jákup í Stórustovu, ið hevur fingið ferðina hjá Kristiani í lag.